

# Starvsfólk søkist

Sp/f Búgv og Smúkkuhjørnið søkja eftir fólki, ið kunnu átaka sær tænastu av kundum okkara, passa handilin og skrivstovuna.

Arbeiðstíðin er umleið 20-30 tímar um vikuna.

Gerandisdagar frá kl. 13.30 til 17.30 og leygardagar frá 10.00 til 14.00

**Vit vænta**
- at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- at tú dugir væl at skriva føroyskt og skilur enskt
- at tú setur kundatænastuna hægst
- at tú ert fyrikomandi
- at tú ert til reiðar at taka eyka tøk, tá á stendur
- at tú hevur royndir innan handilsvirksemi
- at tú hevur kunnleika til bókhald

Hevur hetta tín áhuga, vilja vit fegin frætta frá tær.

Send umsókn saman við møguligum viðmælum til:

Smúkkuhjørnið
J.C. Svabos gøta 12
FO-100 Tórshavn

Annars fæst meira at vita um starvið á tlf. 21 33 03

# SKRIVARI TIL Hvalbiar kommunu

Hvalbiar kommuna søkir eftir skrivara at byrja sum skjótast. Talan er um eitt fulltíðarstarv.

**Starvið**
Tann, ið settur verður, skal m.a. taka sær av
- øllum vanligum uppgávum hjá kommununi
- luttaka á bygdaráðsfundum
- postavgreiðslu og
- journalisering

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- hava teldufluleika
- hava kunnleika til fíggjarstýring og fyrisitingarrætt

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til Advokatvirkið Postsmoga 85, 110 Tórshavn

Umsóknin skal verða undirritaða í hendi í seinasta lagi 01.02.2010 Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hans Trygva Teirin, adv. tlf. 225045.

**Advokatvirkið**

Páll Nielsen
Sigmund Poulsen
Eyðhild Skaalum
Hans Trygvi Teirin

Skansavegur 1
Postsmoga 85
110 Tórshavn
Tlf. 31 21 71
fax 31 58 74
pall@advokatvirkid.fo

Runavíkar kommuna

# Pedagogar til Dagstovnin í Skálafirði

Søkt verður eftir pedagogum til Dagstovnin at byrja 15. Feb. 2010 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja er:**
2 pedagogar til Dagstovnin í Skálafirði 30 t/v. til 35 t/v. til vøggu- ella barnagarsstovu.

Á stovninum eru 2 vøggustovur og 1 barnagarðsstova. Vit eru ein stovnur undir Runavíkar Kommunu og halda til í leiðaðum hølum í Kelduni í Skálafirði.

Í aug. 2010 flyta vit í nýggjan stovn ávikavist á Skála og Søldafirði.

**Vit ynskja**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú við nýhugsan hevur hug, til at skapa og seta dám á okkara stovn.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Hjálparfólk eru í starvinum, og verða verandi í teimum, um eingin pedagogur søkir.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 212252

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:

Dagstovnin í Skálafirði
Skálafjarðarvegur 26
FO-485 Skálafjørður
Mail: dagsol@olivant.fo
www.123hjemmeside.dk/Dagstovnurin

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 08.02.2010, kl. 12.00

**Runavíkar kommuna**




**Gott bingo verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 1. februar kl. 19.00**

**Bygdarfelagið Glæman**

# Frá Felagsnevndini fyri Føroysku fráhaldsfeløgini

**Aðalfundur verður í Losjuni í Havn tann 13. febuar 2010 kl. 16.00.**

Skrá: sambart lógum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin.

**Nevndin**

# Ert tú góður við tíni húsdjór?

So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið





**SPECIAL (20 kg)**

Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Serlig oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum gevur ein blankan og skínandi pels og syrgir fyri at pelsurin ikki gerst turrur. Er tískil eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SPECIAL er eisini sera gott fóður til eldri hundar.

**Fyri posan...... kr. 450,-**



**SØCLA (20 kg)**

Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Inniheldur serliga oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum, ið gev ein blankan og skínandi pels. Er tískil sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SØCLA er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.

**Fyri posan...... kr. 540,-**



**SKYTTENs KAT (15 kg)**

Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr hønsarungalivur, ið m.a. stimbrar smakkin. Lága PH-virðið fyribyrgir urinsteini (struvitkrystallum). Inniheldur TAURIN, ið er ein aminosýra, ið hevur týdning fyri nethinnuna, hjartamuskulaturin og immunverjuna.

**Fyri posan...... kr. 390,-**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er hágóðskufóður, ið hevur verið framleitt í Danmark síðan 1970. Fóðurið verður útflutt til nógv lond og fæst nú eisini í Føroyum. Fullfóðurið er framleitt úr fiski og hønsarunga og inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.

**Bíleggjast kann við at senda t-post til kho@olivant.fo ella við at ringja á tel. 22 12 40. Ókeypis útkoyring í Tórshavn**

www.fjorukrogvin.fo

- *Matstova*
- *Søgusavn*
- *Gávubúð*



FJØRUKRÓGVIN
Restaurant - Bar
*Tel. 471505 / 281505*



**FRENSUR burturblivin**

Mánakvøldið/týsmorgun 18.01-19.01.10. er 1 ára gamal grástríputur frensur burturblivin á abbatrøð.

**Hevur nakar sæð hann vinarliga ring 591963**


www.sosialurin.fo